## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av eystri og regn. Seinnapartin nakað minni vindur av landsynningi og ælingur, men onkur sólglotti. Hitin millum 5 og 9 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av eystri, seinnapartin upp í hvassan vind av landnyrðingi. Ælingur, men onkur sólglotti og hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi og ælingur, men seinnapartin minni vindur og yvirhøvur turt. Hitin millum 6 og 9 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin veksur hann vindin av eystri og landnyrðingi. Týsdagin minni vindur av útnyrðingi. Ælingur og hitin millum 5 og 9 stig.

# Ein nýggj Eivør

**Í dag er útgávudagurin av nýggju fløguni hjá Eivør Pálsdóttir, Eivør LIVE, sum nú vil víðari við síni lívsleið, og endar hetta tíðarskeiðið við einari nýggjari LIVE útgávu**

TÓNLEIKUR
*Barbara Holm*
*barbara@sosialurin.fo*



Eivør Pálsdóttir hevur í mong ár verið ein av okkara fremstu songkvinnum, og hon hevur verið at hoyrt í nógvum ymiskum høpum. Tað byrjaði alt við ársins songrødd og Clickhaze, og síðani hevur Eivør sungið við nógvum ymsikum tónleikarum og bólkum.

### Vil ganga nýggjar leiðir

Nú vil Eivør Pálsdóttir seta eitt punktum fyri tí farna, tí nú vil hon royna nýggjar leiðir, og fer í komandi árið yvir til meira rokk kendan tónleik.

- Eg vil við hesari fløguni geva eina uppsavning av tí gomlu Eivør, tí í 2010 kemur ein nýggj fløga út, sum ikki minnir um tað, sum eg áður havi gjørt. Tað eru millum annað tríggir limir úr Clickhaze, sum eru við á tí fløguni, sigur Eivør Pálsdóttir við Rás2 í dag.

### Ein mynd av lívsleiðini

Nýggja fløgan er ein sigandi mynd av lívsleiðini hjá Eivør. Har eru LIVE upptøkur frá millum annað Japan, Íslandi og Týsklandi, og Teitur Lassen er gestasangari á fløguni.

- Eg og Teitur framførdu samstundis í Íslandi fyri tíð síðani, og vit endaðu so bæði í einari útvapssending. Tey bóðu okkum um at syngja okkurt saman, og vit royndu okkum við sanginum hjá Nikolinu á Kamarinum, Mær Leingist, sigur Eivør Pálsdóttir.

Á fløguni er eisini ein útgáva av lagnum hjá Hanus G. Johansen, Saknur, umframt fleiri av egnu løgunum hjá Eivør.

Fløgan kemur í handlarnar í dag, og Eivør verður í Tutl Handlinum á Káta horninum í dag, har hon eisini fer at undirskriva fløgur og framføra LIVE.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -9 |
| Nuuk | -4 |
| Qaqortoq | -3 |
| Ammassalik | -4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 2 |
| Seyðisfjørður | 5 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 13 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 10 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 7 |
| Keypmannah. | 6 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 4 |
| Warzawa | 1 |
| Kiev | -2 |
| Bukarest | 4 |
| Paris | 12 |
| Madrid | 18 |
| Róm | 12 |
| Malorca | 21 |
| Athen | 16 |
| Malta | 19 |
| Tunis | 21 |
| Beijing | 12 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | 34 |
| Sydney | -- |
| New York | 14 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | 16 |
| Panama | -- |
| La Paz | 17 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 21 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:



Komandi nátt:



**Síðstu nátt:**
Eitt djúpt lágtrýst, 968 hPa. á 56N-23V fer eystureftir og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjanáttina.

**Komandi nátt:**
Lágtrýstið við Hebridurnar fer spakuliga í útnyrðing og brúgvalagið yvir Føroyum fer sum frálíður norðureftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 3/11 kl. 06⁰⁰ – 4/11 06⁰⁰. Hitin í gjár: 8,9°
Minsti hiti máldur í oktober: -4,0° -
Mesti hiti máldur í oktober: +18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 5,0 mm – mált frá 3/11 kl. 06⁰⁰ – 4/11 06⁰⁰.
Avfallið higartil í oktober: 13 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

7. november Mánin næstur jørðini
9. november Seinna kvarter
16. november Tendring
22. november Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 12.nov | 02:34 | 14:56 | 01:34 | 13:56 | 01:49 | 14:11 | 04:34 | 16:56 | 05:34 | 17:56 | 00:49 | 13:11 | - | 12:11 | 02:49 | 15:11 | 03:49 | 16:11 | 02:19 | 14:41 | 03:34 | 15:56 |
| 13.nov | 03:18 | 15:40 | 02:18 | 14:40 | 02:33 | 14:55 | 05:18 | 17:40 | 06:18 | 18:40 | 01:33 | 13:55 | 00:33 | 12:55 | 03:33 | 15:55 | 04:33 | 16:55 | 03:03 | 15:25 | 04:18 | 16:40 |
| 14.nov | 04:03 | 16:27 | 03:03 | 15:27 | 03:18 | 15:42 | 06:03 | 18:27 | 07:03 | 19:27 | 02:18 | 14:42 | 01:18 | 13:42 | 04:18 | 16:42 | 05:18 | 17:42 | 03:48 | 16:12 | 05:03 | 17:27 |
| 15.nov | 04:50 | 17:14 | 03:50 | 16:14 | 04:05 | 16:29 | 06:50 | 19:14 | 07:50 | 20:14 | 03:05 | 15:29 | 02:05 | 14:29 | 05:05 | 17:29 | 06:05 | 18:29 | 04:35 | 16:59 | 05:50 | 18:14 |
| 16.nov | 05:39 | 18:04 | 04:39 | 17:04 | 04:54 | 17:19 | 07:39 | 20:04 | 08:39 | 21:04 | 03:54 | 16:19 | 02:54 | 15:19 | 05:54 | 18:19 | 06:54 | 19:19 | 05:24 | 17:49 | 06:39 | 19:04 |




javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo